# Chase á nýggjárskonsert

**Chase fer at spæla á nýggjárskonsertini saman við All That Rain og Eyðun og Terja**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*Chase verður aftur á føroyskum palli, tá nýggjárskonsertin verður í Havn síðst í desember mánaði*

Nú er gjørt av, hvørjir bólkarnir verða á árligu nýggjárskonsertini í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Konsertin verður 29. desember.

Talan verður um tríggjar væl kendar bólkar, sum hava gjørt nógv um seg gjøgnum árini.

Høvuðsnavn á konsertini verður rockbólkurin Chase, sum seinni í vikuni kemur við næstu fløgu teirra. Tann fyrra kom fyri 10 árum síðani.

Chase hava verið nógv frammi í ár, nú nógv tónleikaáhugað hava fylgt við í arbeiðnum hjá teimum við nýggjari útgávu. Nú er hetta arbeiðið komið so langt, at nýggja fløgan verður løgd fyri almenningin fríggjadagin.

## Aftur á pall

Tá arbeiðið við fløguni hjá Chase fór í gongd, segði sangarin í bólkinum, Edmund Jacobsen, at hann vildi gjarna sleppa aftur á pallin saman við Chase. Hetta gerst nú veruleiki, tí fyri fyrstu ferð í fleiri ár fer Chase at spæla live.

Chase spældi nógv seinast í 80'unum og fyrst í 90'unum, men síðani teir góvust hava teir bert havt onkra hendinga framførslu.

Nú fara teir at spæla sangir av nýggju fløguni, umframt at teir helst fara at tríva í onkran gamlan slagara, sum gjørdi teir so væl dámdar fyri 10 árum síðani.

## Hans á odda

All That Rain gav tíðliga í summar út eina fløgu, og síðani ymiskt hent við bólkinum. Jens Marni Hansen, sum var frontfigurur í bólkinum, segði upp, tí hann hevði ikki hug at gera so nógv við tónleikin.

Síðani er nýggjur maður komin í hansara stað, og tað er eisini ein maður, sum bæði syngur og spælir gittar. Hans Ravnsfjall hevur longu roynt seg á onkrum smærri konsertum við All That Rain, og næstu tíðina verður onkur framførsla afturat á skránni.

Higartil hevur tað gingið væl hjá nýggja All That Rain. Teir hava vant nógv, og Hans Ravnsfjall hevur víst dygir sum sangari og gittarspælari.

## Eisini poppur

Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen verða triðji bólkurin á konsertini. Her er talan um tveir av fremstu poppkomponistunum í landinum. Teir hava skrivað eina øgrynnu av sangum, hvør sær og eisini saman, og slagararnir hjá teimum teljast á meira enn bæði einari og tveimum hondum.

Eyðun og Terji fara at hava bólkin hjá sær afturat sær, og teir fara at spæla nakrar av teimum sangunum, sum fólk kenna frá seinastu 20 árunum í føroyskum tónleiki.

Tað er Kyndil, sum skipar fyri nýggjárskonsertini.

# Eyðun og Terji spæla til jóladans



Beint fyri jól verður stórt dansitiltak í ítróttarhøllini á Hálsi. Tað verða teir báðir, Eyðun Nolsøe og Terji Rasmussen, sum fara at spæla saman við bólki sínum.

Teir fara eisini at spæla á nýggjárskonsertini, sum er millum jóla og nýggjárs, men fyrst framførslan verður á Kambsdali leygarkvøldið 22. desember.

# Brøðurnir Poulsen spæla hjá Logan

**Óli Poulsen hevur framleitt tveir av sangunum á nýggjari jólafløgu hjá Johnny Logan. Beiggi Óla, Hans Poulsen, spælir eisini gittar á fløguni**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*Brøðurnir Óli og Hans Poulsen spæla á nýggju jólafløguni hjá íranum Johnny Logan. Óli hevur framleitt tveir av sangunum á fløguni*

Írin Johnny Logan, sum er best kendur fyri luttøku sína í Grand Prix kappingunum, hevur júst latið nýggja jóla fløgu úr hondum.

Sangirnir á hesi fløgu eru framleiddir í Danmark, og ymiskir framleiðarar hava verið uppi í. Ein teirra er okkara egni Óli Poulsen, sum fyrr í ár eisini samstarvaði við Logan í sambandi við aðra útgávu. Óli hevur framleitt tveir av sangunum á fløguni, og hann spælir eisini fleiri ljóðføri á hesum sangum.

## Hans eisini við

Harafturat hevur beiggi Óla, ungi og evnaríki Hans Poulsen, eisini havt ein leiklut á hesi útgávu. Hann spælir gittar á teimum sangunum, sum Óli hevur framleitt, og tað kemur hann sum vanligt væl frá.

Hans Poulsen roynir síni tónleikaligu evni í Danmark í løtuni. Áður hevur hann arbeitt við tónleiki í Føroyum, og hann var til dømis maðurin aftan fyri tónleiki á útgávuni Vit eru glað, sum kom út í august mánaði.

Nýggja jólafløgan hjá Logan kallast Save this Christmas for Me, og hon fæst sjálvsagt eisini til keyps í Føroyum.




Fæst nú til keyps kring landið




Við Tónleiki 2001 ber tað til at koma tættari at føroyskum tónleiki enn nakrantíð áður. Tú sleppur á pallin, aftur um pallin, inn í upptøkuhølini og á ferð uttanlands við bólkum. Tú hittir tónleikararnar, sum tað snýr seg um, og teir siga frá, hvussu teir upplivdu ymsar hendingar í árinum. Eitt umfatandi yvirlit yvir hendingar og útgávur í árinum eru eisini í bókini.

Árbókin er 116 síður til støddar, og alt er í litum. Í bókini eru nógvar myndir, sum ikki hava verið frammi áður.

Sosialurin & pop.fo